STARVSLÝSING:

# Ert tú Heilsufrøðingur?

**Gigni – heilsufrøði til børn og ung søkir eftir heilsufrøðingum til trý størv, ið verða at seta 1. apríl 2011 ella skjótast tilber.**

**Talan er um:**
24 tímars arbeiðsviku til skúlarnar í Norðstreymoy/Eysturoy
40 tímars arbeiðsviku til smábarnaøkið í Eysturoy
24 tímars arbeiðsviku til skúlarnar í Eysturoy

**Vit kunnu bjóða:**
- Sjálvstøðugt, spennandi og avbjóðandi arbeiði
- Fakligt mennandi umhvørvi
- At verða partur av einum samstarvstoymi við jaligum og eldhugaðum starvsfelagum
- Væntast kunnu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir í samband við menningartilgongd

**Førleikakrøv:**
- Útbúgving sum heilsufrøðingur
- Góð evnir til at samstarva innanhýsis og tvørfakliga
- Áhuga fyri fakligari menningartilgongd

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarin hevur royndir frá heilsufremjandi arbeiði á barna- og/ella familjuøkinum.
Arbeiðið er skipað í samstarvstoymir, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna toymið.

**Lønar- og setanartreytir:**
Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn skal sendast til:**
Gigni
Niels Finsensgøta 37
Postboks 132
110 Tórshavn

**Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 21. mars 2011, kl 10.00.**

Meiri fæst at vita við at ringja til 562300 / 562310, ella á heimasíðu okkara www.gigni.fo

Visiónin hjá Gigni er at vera ein miðsavnandi vitanar- og ráðgevingardepil, sum gongur á odda í tilgongdini at menna fólkaheilsu til børn og ung.
Missiónin er at savna vitan og vera ráðgevi hjá landsmyndugleikum, stovnum og øðrum fakfólkum, umframt alment at kunna um viðurskifti, sum viðvíkja fólkaheilsu hjá børnum og ungum. Gigni - Heilsufrøði til børn & ung skal ganga á odda í heilsufremjandi og fyribyrgjandi átøkum, í mun til fólkaheilsu hjá børnum og ungum.

**GIGNI - HEILSUFRØÐI TIL BØRN & UNG** | NIELS FINSENSGØTA 37 | POSTBOKS 132 | 110 TÓRSHAVN | TLF. 56 23 00 | WWW.GIGNI.FO

---

**Starvslýsing**

# STJÓRNARSKRIVARI TIL TF SAMTAKIÐ

Vilt tú vera við til at bera eitt spennandi samtak framá?
Klárar tú at hava fleiri bóltar í luftini í senn og halda høvdið kalt?
Ert tú analytisk/ur?
Dugir tú at orða teg væl í skrift og talu?
So er eitt spennandi starv at søkja í TF samtakinum.

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt fjølbroytt og avbjóðandi starv í einum spennandi samtaki, sum er í støðugari menning. Eitt starv í einum samtaki við greiðum málum, virkisfúsum starvsfólkum og góðum arbeiðsumstøðum. Eitt samtak við fimm ítøkiligum kjarnuvirðum. Har vit hava vilja til lønandi vøkstur, virða heildina, eru ágrýtin og nærløgd, hava eina langtíðarhugsjón og eru broytingarsinnað. Til rætta fólkið hava vit eitt gott og avbjóðandi starv við kappingarførari løn, góðum setanartreytum, sjálvstøðugum arbeiðsøki og góðum møguleikum fyri støðugari førleikamenning, har viðkomandi sjálv/ur verður við til at byggja starvið upp og mynda tað frameftir.

Talan er um nýtt starv, so tillagingar kunnu møguliga ávirka uppgávuinnhaldið. Tann, sum verður settur, má tí kunna tola møguligar broytingar/tillagingar í starvinum.

Stjórnarskrivarin arbeiðir tætt við stjóranum og skal samskipa mál og ráðgeva stjórn og nevnd í TF samtakinum. Stjórnarskrivarin hevur eisini tætt samstarv við sekretariatið í Samtakinum.

**Arbeiðið fevnir millum annað um at:**
- lýsa mál og gera frágreiðingar
- gera innstillingar til nevnd og stjórn
- fyrireika nevndarfundir
- vera við í fyriskipan av tiltøkum og átøkum rundanum stjórn og nevnd

**Vit vænta, at tú:**
- hevur hóskandi hægri útbúgving, t.d. kandidat ella master innan løgfrøði og/ella búskap
- hevur arbeiðsroyndir í minsta lagi svarandi til fulltrúastøði í eini miðalstórari fyrisiting
- hevur kunnleika til føroyskt vinnulív og umsiting
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst
- hevur góð samstarvsevnir og vilja
- dugir væl at samskifta, bæði á føroyskum, norðurlendskum og enskum

**Lønar-og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum.

Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika. Hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Regin Hammer, stjóra, við telduposti til rh@trygging.fo ella Mariu á Dul, deildarstjóra, við telduposti til mad@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 11.marts 2011 kl. 12.00.

**Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:**

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TF HOLDING